# Álit um hvussu karmarnir um trygdar- og eldsløkkiútbúgvingar kunnu samskipast

## Fororð

Í fleiri ár hevur verið tosað nógv um, bæði alment og í fjølmiðlunum, hvussu farast skal fram við at útbúgva fólk innan eldsløkking og trygd á sjógvi og landi. Seinnu árini eru krøvini til trygdarútbúgvingar, ið verða sett til arbeiðsfólk, ið ætlar sær at starvast í oljuvinnuni, komin aftrat. Av tí at fleiri av stýrunum hjá Føroya landsstýri hava áhuga í, at karmarnir verða teir best møguligu fyri hesum útbúgvingum, at tilfeingi verður samskipað á besta hátt og fyri at tryggja so skilagóðan rakstur av kravdu undirvísingini sum gjørligt, varð farið undir at kanna, hvussu hetta kann gerast.

**Inngangur**
Í skrivi dagfest 5. februar 2001 setti landsstýrismaðurin í mentamálum arbeiðsbólk við 1 umboði út Mentamálastýrinum (Óli Hans Hammer Olsen), 1 umboði úr Oljumálastýrinum (Súsanna Sørensen), 1 úr Vinnumálastýrinum (Petur Lava Olsen) og 1 úr Fiskimálastýrinum (Eyðun Berth Jacobsen). Skrivari hjá nevndini hevur verið Claus Reistrup frá Mentamálastýrinum.

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum var at kanna og staðfesta:

1. Hvørjir fysiskir karmar skulu til, t.e. bygningar og annar útbúnaður, fyri at ein stovnur, ið veitir Trygdar- og brandsløkkiútbúgvingar kann virka fullgott.
2. Hvørji tiltøk skulu gerast fyri at øki, bygningar og útbúnaður lúka øll lógarásett krøv og krøv annars til undirvísing, arbeiðsumhvørvi, trygd, heilsu og umhvørvi.
3. Fíggjarligir fyrimunir og vansar ið standast av at flyta Føroya Brandskúla til Klaksvíkar ella aðrastaðni í landinum skulu lýsast. Útbúgvingarstøðin skal liggja á einum staði, har útbúnaður til venjingar ið OPITO og OLF og oljuídnaðurin annars krevja til venjingar, kann byggjast aftrat.
4. Í hvønn mun kunnu útbúgvingar samskipast soleiðis at avriksflutningur kann fara fram millum trygdar- og brandsløkkiútbúgvingar til oljuvinnuna og ávísar STCW kravdar útbúgvingar.
5. Hvussu skal stovnurin skipast umsitingarliga, um so er, at Trygdarmiðstøðin og Brandskúlin verða løgd saman til ein stovn.
6. Hvussu allar útbúgvingar og skeið innan eldsløkking verða samskipaðar.

**Arbeiðsgongd**
Arbeiðsbólkurin hevur hildið 10 fundir. Herumframt hevur bólkurin verið á kanningarferð til Áir og Klaksvíkar, har m.a. varð vitjað á Brandskúlanum við Áir og á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík. Á kanningarferðini tosaði bólkurin við umboð fyri Hósvíkar Kommunu og Klaksvíkar Býráð.
Bæði Klaksvíkar Býráð og Hósvík Kommuna vístu vælvild mótvegis at byggja ein Trygdardepil í teirra kommunu. Víst verður annars til hjáløgdu frágreiðing frá kanningarferðini.

Arbeiðsbólkurin fór til verka við at lýsa fysisku karmarnar við Áir og í Klaksvík eins og útgerðina á báðum støðunum. Uppskrivað varð, hvat restaði í fyri at verandi útgerð kundi nøkta tørvin í framtíðini, bæði innan fiski- og sjóvinnuni, bjarging á sjógvi og landi og í eini komandi oljuvinnu.

Arbeiðsbólkurin umrøddi eisini støðið, sum brand- og trygdarskeið skulu vera á í Føroyum, og semja var um at hesi skeiðini skulu lúka øll lógarásett krøv og krøv annars til undirvísing, trygd, heilsu og umhvørvi. Harumframt skulu skeiðini eisini lúka altjóða krøv.

**Verðandi virksemi**
Skeiðini, sum í løtuni verða hildin á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík og á Føroya Brandskúla við Áir, vórðu lýst, samstundis sum krøvini, ið verða sett í framtíðini, vóru umrødd: innanlendis krøv (tilbúgving, venjing av sløkkiliðsmonnum og bjargingarliðum), og krøv sbrt. STCW- og NSOAF[1] ásetingum. Í hesum sambandi varð niðanfyristandandi yvirlit uppsett:

[1] North Sea Offshore Authority Forum (Mynugleikar kring Norðsjógvin, ið varða av trygd í frálandavinnuni)

**Yvirlit yvir trygdarútbúgvingar**

| | STCW[2] | OLF[3] | |
|---|---|---|---|
| 1 | Skip | Olja | Land |
| 2 | Trygdarskeið | | Bjargingarskeið |
| 3 | Brand | Brand | Brand |
| 4 | Bátaførari | Bátaførari | |
| 5 | Víkað fyrstahjálp | Víðkað fyrstahjálp | Víðkað fyrstahjálp |
| 6 | Vandamikil farmur | Vandamikil farmur | Vandamikil farmur |

Sìðani vórðu niðanfyristandandi talvur við frágreiðingum gjørdar.

**Skeið ið verða boðin út í dag:**

| Nr. | Heiti á skeiði | Longd | Stovnur | Tilvísing |
|---|---|---|---|---|
| 1 | ARPA | 4 dagar | Føroya Sjómansskúli | IMO Resolutión A 428 |
| 2 | GMDSS/GOC | 15 dagar | " | STCW-95 A – IV/2 |
| 3 | GMDSS[4] – ROC | 5 dagar | " | " |
| 4 | Tanker Safety | 5 dagar | " | STCW – 95 A – V/I |
| 5 | Vandamikil farmur | 4 dagar | " | IMO Resolutión A 537 (13) |
| 6 | Arbeiðsumhvørvi | 3,5 dagar | " | Søfartsstyrelsen |
| 7 | ISM fyrireikingarskeið | 2 dagar | " | IMO resolution A. 741 (18) |
| 8 | SRC (VHF) | 5 kvøld | " | STCW-95 A – IV/2 |
| 9 | GMDSS/GOC | 15 dagar | Klaksvíkar Sjómansskúli | STCW-95 A – IV/2 |
| 10 | Grundleggjandi brandskeið | 1 dagur | Føroya Brandskúli | STCW-95, Ávíst í reglu VI/3 stk. 2, ikki ávíst í kotuni |
| 11 | Brandskeið og roykkaving | 3 dagar | " | STCW VI/3 |
| 12 | Brandleiðaraskeið | 2 dagar | " | STCW VI/3 |
| 13 | Bjargingarbátaførari | 3 dagar | Trygdarmiðstøðin | STCW kota VI/2-1 |
| 14 | MOB/FRC | 2 dagar | " | STCW kota VI/2-2 |
| 15 | Trygdarskeið fyri sjómenn | 5 dagar | " | STCW-95 VI/1 |
| 16 | Grundleggjandi brandskeið | 1 dagur | " | Partur av 10. Tillagað fiskivinnuni |

Sjóvinnan hevur tørv á øllum hesum skeiðunum, sbrt. innlendis og altjóða krøvum, sí tilvísingarnar.

Ávís skeið, sum í dag verða hildin á Føroya sjómansskúla, eru tikin við, av tí at oljuvinnan óivað fer at krevja útbúgvingar, ið snúgva seg um somu evni, og seta somu førleikakrøv til skeiðshaldarar.

---

[2] STCW (International Convention on Standards of Training, Certification and Watchkeeping for Seafarers). Sáttmáli hjá IMO (International Maritime Organisation) ið ásetur minstu førleikakrøv fyri skipsmanningar.

[3] OLF (Olieindustriens LandsForening) Áhugafelagsskapur og arbeiðsgevarafelagsskapur hjá oljufeløgunum og veitarafeløgunum.

[4] Global Maritime Distress Safety System (Samskiftisskipan ið kravd er umborð á skipi. Kravt er eisini at ávíst tal av manningini skal hava útbúgving til at nýta hesa skipan).

Haraftrat er sannlíkt, at allir boripallar, sum koma at bora á føroyskum øki, hava GMDSS útgerð. Smb. altjóða krøvum skulu bjargingarbátar eisini hava VHF.

Viðvíkjandi verandi útgerð verður víst til hjáløgdu yvirlit yvir ávikavist útgerð á Trygdarmiðstøðini, og útgerð á Føroya Brandskúla

**Framtíðin**
Í sambandi við uppseting av framtíðar skeiðstørvi til oljuvinnuna varð hugt at skeiðsskránni hjá Danish Offshore School og krøvunum hjá OLF. Nærri kanningar, vórðu gjørdar av hesum upplýsingum, og saman við vitan sum er í bólkinum, varð funnið fram til niðanfyrinevnda skeiðstørv til oljuvinnuna. Hesi skeið vera ikki boðin út í dag..

**Framtíðartørvur á skeiðum:**

| Nr. | Heiti á skeiði | Longd | Stovnur | Tilvísing |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Grundlæggende norsk sikkerhedsuddannelse | 1 dag | Trygdarmiðstøðin | OLF/Oljuvinnan |
| 2 | Elementær sikkerhed | 2 dagar | Trygdarmiðstøðin | Oljuvinnan |
| 3 | Udvidet sikkerhed | 2 dagar | Brandskúlin | Oljuvinnan |
| 4 | HLO | 2 dagar | Flogvøllurin/Brandskúlin | Oljuvinnan |
| 5 | Brandleiðaraskeið | 2 dagar | Brandskúlin | Oljuvinnan |
| 6 | Vaktarskip | 6 dagar | Føroya sjómansskúli/ Trygdarmiðstøðin | Oljuvinnan |
| 7 | Fyrsta hjálp | 3 dagar | Føroya sjómansskúli | Oljuvinnan |
| 8 | Fyrsta hjálp | 2 dagar | Føroya sjómansskúli | Oljuvinnan |
| 9 | Instruktionsteknik | 5 dagar | Føroya sjómansskúli | Oljuvinnan |
| 10 | Fríttfallsbátur | 1 dagur | Trygdarmiðstøðin | Oljuvinnan |
| 11 | Helicopter Underwater escape | ½ dagur | Verður skipað sum partur av øðrum skeiði | |
| 12 | Skeið fyri sløkkiliðsmenn, bjargingarfeløg o.s.fr. | X dagar | Brandskúlin | Smb. kunngerð sum er í gerð. |

**Sjóvinna**
Sum áður nevnt lúka verðandi skeið innlendis- og altjóða ásetingar innan sjóvinnu. Sambært nýggjari reglugerð sum kom í gildi í 1997 skulu allir sjómenn nú hava trygdarskeið. Sum er taka árliga umleið 500 sjómenn trygdarskeið. Hesi skeið skulu endurnýggjast fimta hvørt ár.

**Tilbúgving á landi**
Fyri sløkkiliðs- og bjargingarfólk á landi eru ongar beinleiðis ásetingar um útbúgving, men arbeitt verður í løtuni við at gera kunngerð hesum viðvíkjandi, smb. § 8 í løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 um elsdsbruna / brand m.v. Tað merkir, at allir sløkkiliðsmenn í landinum skulu á skeið. Talan er um umleið 700 menn sum skulu ígjøgnum skipanina. Hesir somu menn skulu eisini regluliga hava venjingar, og gevur ein slíkur trygdardepil frálíkar karmar um slíkar venjingar.

**Sjálvbodnu bjargingarfeløgini**
Viðvíkjandi tilbúgving á landi mugu sjálvbodnu bjargingarfeløgini eisini havast í huga. Tilboð um útbúgvingar fyri limirnar í bjargingarfeløgunum skulu gerast, og verða hesi útbúgvingartilboð natúrliga veitt av einum trygdardepli.

**Oljuvinnan**
Innan oljuvinnuna liggur ábyrgdin fyri trygd og trygdarútbúgvingum hjá hvørjum einstøkum fyristøðufelag. Karmarnir hesum viðvíkjandi eru lýstir av Oljumálastýrinum í kunngerð nr. 35 frá 7. marts 2001, um heilsu trygd og umhvørvi í leitiskeiðnum. Mannagongdirnar hjá fyristøðufeløgunum skulu eisini góðkennast av Oljumálastýrinum.

**Útbúgvingarstað**
Bólkurin varð samdur um at heita á Westtec í Sørvági, um at gera eina lýsing av, hvussu útgerðin á einum trygdardepli kann setast upp, og hvussu tey ymsu økini koma at síggja út, um loysnirnar verða ávikavist:

a: loysn á trimum støðum í Klaksvík
b: heildarloysn við Strond í Klaksvík
c: heildarloysn við Áir

Eisini varð heitt á Westtec um at gera eina yvirorðnaða kostnaðarmeting av hvørji einstakari loysn.

Á fundi 4. mai 2001 í Mentamálastýrinum greiddi Westtec frá teimum kanningum, sum fyritøkan hevði gjørt. Farið varð ígjøgnum tilfarið, og høvuðsniðurstøðan av hesum var: Til eina fult útbygda trygdarmiðstøð á einum staði er lendistørvurin 27.000 fermetrar, og samlaði kostnaðurin er mettur at vera 48.317.500 kr., ella tað sama sum tað kostar at byggja eina samlaða trygdarmiðstøð við Strond í Klaksvík.
Í hesum sambandi verður víst til hjáløgdu frágreiðing frá Westtec.

Útfrá upplýsingunum, ið vóru fingnar til vega frá Westtec, var farið undir at lýsa fyrimunir og vansar, soleiðis sum sett upp niðanfyri. Lýsingarnar eru gjørdar útfrá teimum fortreytum, at alt virksemið fer fram á einum plássi (kommunu).

**A.) Klaksvík, Borðoyarvík + Við Strond**

| Fyrimunir | Vansar |
|---|---|
| 1. langtíðaravtala um bátahyl (bíligur venjingarhylur)<br>2. ávís høli og útgerð eru til taks<br>3. førleiki er uppbygdur innan sjóbjarging<br>4. økið við Strond<br>a) hevur møguleikar fyri útbygging<br>b) liggur langt frá bygdum øki<br>c) liggur langt frá høvuðsferðsluæðr<br>d) kann byggjast út í stigum til eina heildarloysn | 1. trý støð, sum ferðast skal ímillum<br>2. størsta) fjarstøðan millum støðini (6 km)<br>3. avmarkaðir møguleikar fyri útbygging á Borðoyarvík, herundir at bygga brandvenjingarstøð við Borðoyarvík<br>4. langtíðaravtala um leigu av parti av bátahyli<br>5. atgongd til part av økinum við Strond verður ikki klárt fyrrenn 2003<br>6. møguligur undirsjóvartunnul millum Eysturoy og Borðoy kemur upp, har Trygdarmiðstøðin liggur og roykur kann verða til ampa fyri ferðsluna<br>7. lærarakreftir til brandundirvísing ikki á staðnum<br>8. kantinuviðurskifti |

Viðmerkjast skal, at um henda loysn verður vald, mugu høli til ástøðiligu undirvísingina útvegast aðrastaðni í býnum, og koma einstøku skeiðini sostatt at fara fram á trimum støðum, ið liggja somikið langt frá hvørjum øðrum, at nógv tíð skal nýtast til flutning.

Um trygdarmiðstøðin verður løgd sum heildarloysn í Klaksvík, og verandi hentleikar á Borðoyavík verða brúktir, samstundis sum bygging av neyðugum venjingarøkjum/hølum fer fram við Strond, er samlaða kostnaðarmetingin 34.930.500 kr.
Tað kann verða óheppið at taka part av bátahyli til sjótrygdarvenjingar, av tí at bátahyljar verða bygdir til annað endamál.

**B.) Heildarloysn við Strond í Klaksvík**

| **Fyrimunir** | **Vansar** |
|---|---|
| 1. alt liggur á einum staði<br>2. førleiki er uppbygdur innan sjóbjarging<br>3. økið við Strond<br>a) hevur møguleikar fyri útbygging<br>b) liggur langt frá bygdum øki<br>c) liggur langt frá høvuðsferðsluæðr<br>d) kann byggjast út í stigum til eina heildarloysn<br>4. møguleiki er fyri at byggja ein miðdepil til endamálið frá grundini<br>5. umsitingin verður á einum staði | 1. atgongd verður til 12000 m$^2$ av økinum við Strond í 2003. Hetta merkir, at útbúgvingar ikki kunnu verða bodnar út fyrr enn í fyrsta lagi 1 ár eftir, at økið er klárt, t.v.s í 2004<br>2. lærarakreftir innan brandskúlaundirvísing eru ikki til staðar í økinum |

Lendið, har grótbrotið liggur, er ikki nýtiligt enn, men sum frálíður, verður atgongd til eitt somikið stórt øki, at bert hugflogið setur mørk fyri, hvussu økið kann útbyggjast. Ráðgevandi verkfrøðingarnir meta hetta lendið at vera sera áhugavert. Farast kann undir 1. byggistig í 2004.
Um trygdarmiðstøðin verður løgd sum heildarloysn við Strond í Klaksvík, er samlaða kostnaðarmetingin 48.317.500 kr. Kostnaðurin verður áleið hin sami, um støðin verður bygd aðrastaðni í landinum undir somu fortreytum.

**C.) Við Áir**

| **Fyrimunir** | **Vansar** |
|---|---|
| 1. høli og útgerð eru til taks til brandskúla<br>2. førleiki er uppbygdur innan brandskúlaundirvísing<br>3. alt liggur á einum staði<br>4. møguleiki fyri stigvísari útbygging<br>5. liggur langt frá bygdum øki<br>6. liggur uppat høvuðsferðsluæðr<br>7. økið er tøkt<br>8. møguleiki er fyri, at ALV-skúlin verður til taks, so hølini kunnu brúkast til undirvísing, umsiting og innivist<br>9. umsiting verður á einum staði<br>10. plaseringin ger, at tørvurin á høli til innivist verður avmarkaður | 1. liggur tætt uppat høvuðsferðsluæðr (roykur kann gerast ein ampi hjá ferðsluni)<br>2. lærarakreftir innan sjótrygd eru lutvíst til staðar<br>3. sjótrygdarparturin er ikki til staðar<br>4. ávísar tillagingar av verandi hølum og útgerð eru neyðugar fyri at verða partur av heildarloysn<br>5. eingin avtala fyriliggur um nýstlu av ALV-skúlanum |

Alt økið við Áir er tøkt til at byggja ein trygdardepil á. Nakrar tillagingar mugu tó gerast við verðandi útgerð. Hetta er ikki við í frágreiðingini frá Westtec, men ein leyslig kostnaðarmeting

sigur, at hesar tillagingar, eitt nú flyting av maskinrúminum, kunnu gerast fyri minni enn hálva millión krónur.
Um trygdarmiðstøðin verður løgd sum heildarloysn við Áir og verandi hentleikar verða brúktir, er samlaða kostnaðarmetingin 32.125.500 kr. Íroknað er keyp av húsunum hjá ALV-skúlanum fyri 3 mill. kr., um tey verða til sølu.

Annars verður víst til hjáløgdu frágreiðing frá Westtec, har fyrimunir og vansar við at leggja trygdardepil á ymsum plássum eru lýstir nærri.

**Bygnaður**

*1. Partafelag*

1. Ein møguleiki fyri bygnaði er, at ein komandi trygdarmiðstøð verður skipað sum partafelag. Nógvir partar eru í føroyska samfelagnum, ið mettir verða at hava áhuga í at ein trygdarmiðstøð er í landinum, av tí at teir verða brúkarar av skeiðsvirkseminum á miðstøðini. Raksturin verður fíggjaður við skeiðsgjaldi, og kemur hann sostatt at kappast við trygdardeplar í londunum rundanum okkum, bæði hvat viðvíkur dygd á undirvísing, og eisini, tó í minni mun, kostnaðinum á skeiðunum.
2. Leiðslan á trygdardeplinum vísir til nevndina, eins og í øðrum partafeløgum.
3. Við at skipa trygdarmiðstøðina sum partafelag verður raksturin inntøkufíggjaður. Hetta ger, at tað verður munandi lættari at fremja nýíløgur og at menna virksemið í síni heild. Ein høvuðsorsøk til hetta er, at rakstraravlop kann flytast millum í ársroknskapinum.
4. Lættari verður eisini at útvega serkøna hjálp, eitt nú lærarar, um tørvur er á tí, eisini úr útheiminum.

*2. Sjálvsognarstovnur*

1. Ein annar møguleiki er at skipa eina komandi trygdarmiðstøð sum óheftan sjálvsognarstovn.
2. Fyrimunirnir eru, at ein sjálvsognarstovnur hevur sjálvstøðugan roknskap, og at raksturin er óheftur av landskassanum.
3. Fyrimunir annars eru á leið teir somu, sum við at skipa trygdardepilin sum partafelag.
4. Tó má viðmerkjast, at leiðslan saman við stýrinum fyri sjálvsognarstovnin hevur ábyrgdina av at fíggja raksturin.

***3. Trygdardepil liggur beinleiðis undir einum stýri***

1. Triði møguleikin er at leggja trygdardepilin beinleiðis undir eitt stýri, soleiðis sum vit kenna tað frá øðrum útbúgvingarstovnum.
2. Fyrimunurin er, at viðkomandi stýri fær beinleiðis ábyrgd av stovninum, eisini fíggjarliga ábyrgd.
3. Vansarnir eru, at stovnurin verður tengdur at fíggjarlógini, og loyva roknskaparreglur Landsstýrisins ikki at flyta pening, heldur ikki rakstraravlop, millum ársroknskapir, og kemur hetta at virka sum eitt haft um beinini fyri tí áhaldandi og ofta skjótu menning, ið má fara fram á einum slíkum stovni, um hann skal vera kappingarførur við aðrar stovnar av slíkum slagi.

**Støðan í dag**
Trygdar- og brandvenjingarnar, ið verða hildnar við verðandi útgerð, uppfylla ásettu lógarkrøvini til tørvin, vit hava í dag, men tað er tungt at fara í holt við nýggjar útbúgvingar og at menna tær verandi, av tí at hentleikarnir eru so avmarkaðir. Slíkar útbúgvingar krevja eisini nakað av umsiting. Umsitingin kann skipast nógv dyggari, um talan verður um ein stovn ístaðin fyri tveir. Góðkend góðskustýring av stovnunum er eitt krav, um skeiðini skulu hava altjóða góðkenning aftaná 1. februar 2002.
Millum manna verður ofta funnist at, at fakliga støðið á stovnunum ikki er á nóg høgum støði. Stórur partur av arbeiðsmegini á stovnunum verður nýttur til umsiting, ístaðin fyri at menna undirvísingina.

Brandskúlin við Áir hevur tungan rakstur, og tørvurin á fíggjarligum stuðli veksur ár undan ári. Stuðulin, ið játtaður verður yvir fíggjarlógina er vaksin úr krónum 150.000,- í 1998, til kr. 950.000,- í 2001. Givið er, at neyðugt er við rationaliseringum, fyri at fáa ein betri rakstur.

**Niðurstøða**
Skulu rationaliseringar gerast á útbúgvingarøkinum innan trygd metir nevndin tað vera skilagott at leggja stovnar saman, og við hesum fáa stórrakstrarfyrimunir útnyttaðar, bæði viðvíkjandi umsiting, og øðrum optimeringum, eitt nú:

a. Tað nýtist bert at gera og umsita eina góðskustýringarskipan, ístaðin fyri fleiri.
b. Fullnýtsla av lærarakreftum.
c. Lættari verður at fáa í lag samstarv við líknandi útbúgvingarstøð aðrastaðni, og verða harvið vitanarskifti og menning annars framd.
d. Tað verður lættari fáa til vega serkøna hjálp, herundir skeiðshaldarar, tá tørvur er á tí.

Við verðandi útgerð við Áir og í Klaksvík eru karmarnir til staðar soleiðis at skeið, ið lúka lógarfestu minstukrøvini, kunnu haldast. Sum tað sæst omanfyri, eru umstøðurnar tó ikki optimalar.

Nevndin hevur umrøtt møguleikan at halda fram við verandi skipan við brandskúla við Áir og trygdarmiðstøð í Klaksvík hvør sær. Ráðgevarnir, ið nýttir vórðu, valdu ikki at viðgera henda møguleikan. Nevndin metir tó, at støðirnar kunnu halda fram eftir sama leisti sum nú, tó er neyðugt við nøkrum dagføringum av útbúnaði o.líkn. Nevndin staðfestir, at raksturin verður dýrari við hesari loysn, men samstundis verður íløgutørvurin væl minni í fyrsta umfari.
Nevndin mælir tí til, at møguligar útbyggingar á verandi støðum, verða gjørdar við atliti til, at alt virksemið verður samlað á einum staði í framtíðini

Arbeiðssetningurin leggur ikki upp til, at grundarlagið undir rakstrium av eini trygdarmiðstøð skal kannast. Nevndin mælir til, at ein kanning verður sett í verk, fyri at lýsa tilgongdina av kravdum skeiðum og undir hesum kanna inntøkugrundarlagið í framtíðini. Havast skal í hesum sambandi í huga, at landsstýrismaðurin í Mentamálum og umboð fyri vinnnuna hava gjørt sær tankar um, at ein arbeiðsmarknaðareftirútbúgvingargrunnur verður settur á stovn. Ætlanin er, at hesin grunnur eisini skal hjálpa til at fíggja kravdar eftirútbúgvingar, ið fara fram á einum trygdardepli.

**Tilmæli**
Mælt verður til, at ein samlaður trygdarmiðdepil verður skipaður í stigum á henda hátt:

1. Skipa Føroya Brandskúla við Áir, og Trygdarmiðstøðina í Klaksvík sum ein stovn (trygdardepil).
2. Verðandi útgerð verður samlað á einum stað.
3. Verðandi undirvísing heldur fram, men á einum stað.
4. So hvørt sum tørvurin á aðrari undirvísing á Trygdardeplinum tekur seg upp, verður bygt út samsvarandi.

13/6 -2001

Óli Hans Hammer Olsen, Mentamálastýrið
Formaður

Súsanna Sørensen, Oljumálastýrið

Eyðun Berth Jacobsen, Fiskimálastýrið

Petur Lava Olsen, Vinnumálastýrið

# Álit um hvussu karmarnir um trygdar- og eldsløkkiútbúgvingar kunnu samskipast

## Yvirlit yvir hjáløgd skjøl

1. Bræv frá Klaksvíkar Kommunu, "Viðv. møguligum leigulendi til Trygdarmiðstøð fyri Føroyar".
2. Yvirlit yvir útgerð á Trygdarmiðstøðini.
3. Útgerðaryvirlit fyri einum felags brand og bjargingarskúla.
4. Útgerð til manningar.
5. Kunningarferð týsdagin 6. mars 2001 Til Hósvíkar og Klaksvíkar.
6. Frágreiðing frá Westtec.

klaksvíkar kommuna
FO-700 KLAKSVÍK
FAROE ISLAND
e-mail: klaksvik@post.olivant.fo
Telefon (+298) 456388
Telefax (+298) 456399
Postboks 2
Tekniska Umsiting

**Mentamálastýrið**
**Att.: Óli Hans Hammer Olsen**
**Hoyvíksvegur 72**
**FO-100 Tórshavn**

**J. nr.**

**Your Ref.** **Our Ref.** **Klaksvík, 14. mars 2001**

**Viðv. møguligum leigulendi til Trygdarmiðdepil fyri Føroyar.**

Vísandi til fundin í býráðshúsinum tann 6. mars 2001, har arbeiðsbólkurin, sum arbeiðir við einum trygdarmiðdepli fyri Føroyar, kunnaði seg um møguleikarnar í Klaksvík, senda vit hervið viðkomandi tilfar av økinum á Strond, sum serligur áhugi kanska er fyri.

Verður farið víðari við málinum, verður helst neyðugt at broyta ásetingina, um økið á Strond skal hýsa allari undirvísing í trygd og eldsløkking, og ikki bert frálæruna, sum í dag fæst í Klaksvík. At fáa hesa broyting framda kann taka upp til einar 6 mánaðar.

Verandi áseting sigur, at loyvt er bert at byggja hús til vinnuvirki, ið hava samband við alivinnuna og fiskiskap og virksemi, ið er knýtt at hesum, t.e. skrivstovur, tænastuvirksemi, bilstøðlar og tílíkt. Síðani ásetingin fyri økið varð samtykt av býráðnum, er vestara havnalag í Klaksvík so spakuliga vorðið ein alimiðdepil í kommununi.

Vit rokna tískil við, at møguleiki er fyri, at økið á Strond kann gerast tøkt hjá Trygdarmiðdepli Føroya, hetta sjálvandi treytað av, at øll neyðug loyvir verða fingin til vega.

Upp á fyrispurning tygara kunnu vit boðað frá:

- at leigugjaldið fyri eitt planerað lendið – eitt sokallað grúslendið - frá kommununi er kr. 12,70 pr. fermetur um árið,
- og at vit rokna við, at eitt økið upp á einar 6000 fermetrar kann liggja klárt um eitt ár, og 6000 fermetrar afturat ella meira kann vera klárt um umleið tvey ár.

Um so er at tørvur er á fleiri upplýsingum, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við okkum.

*B.v.*

**Steinbjørn O. Jacobsen**
**borgarstjóri**

**Heri M. Hammer**
**býarverkfrøðingur**

44200/5-4
010450-17

Síða 1 af 1

# Yvirlit yvir útgerð á Trygdarmiðstøðini

## *Verandi útgerð*

Á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík verður fyriskipað trygdarskeið til sjófólk við fiskiskipum, og partvís til sjófólk við handilsskipum. Á støðini er bæði ástøðilig og verklig frálæra um bjarging á sjónum og um bjargingarútgerð.
Tann ástøðiligi parturin fyrigongur í einum undirvísingarhøli, sum í løtuni er í einari skúlastovu á Tekniska skúla í Klaksvík.
Tann verkligi parturin fyrigongur partvís í svinmihøllini í Klaksvík og partvís á venjingarstøðini á Borðoyarvík.

Við bátahylin á Borðoyarvík er bygd ein nýggj venjingarstøð. Støðin er bygd soleiðis upp:

- bygningur uppá 100 m2, harav 60 m2 eru goymsla og verkstað og 40 m2 er umklæðisrúm
- bygningurin er bygdur á einari 35 m langari bryggju, hvar bjargingarútgerð er monterað, t.d. innilokaður bjargingarbátur við davidum og gummibjargingarbátur í einari vøggu
- 400 m2 innigirdur eldsløkkipallur, sum uppfyllir øll umhvørviskrøv
- kør til eldsløkking

## Útgerð, sum hoyrur til tí ástøðiligu frálæruna

- Bókligt frálærutilfar
- Sjónvarp og video til viðkomandi filmir innan bjarging og eldsløkking
- Ymisk útgerð í undirvísingarrúminum, t.d. hydrostatiskur útloysari, samanpakkaður gummibjargingarbátur í einari vøggu, hvar hydrostaturin er monteraður, epirbur og eldsløkkjari.
- Í frálæruni verður víst á útgerðina og hvussu hon virkar

## Útgerð, sum hoyrur til tær verkligu royndirnar

- Innilokaður bjargingarbátur við motori til 12 persónar
- Davidar til bjargingarbátin
- Gummibjargingarbátar
- Bjargingardraktir
- Radari og radartranspondar
- Bjargingarbeltir
- Bjargingarbøra
- Pulvur- og CO2 eldsløkkjarir
- Oljukløði og trygdarstivlar til eldsløkkivenjingar
- Kør til eldsløkkivenjingar
- Slangur og slangukoblingar til vatnsløkking á brandplattinum
- Støðin er útgjørd við ventilatiónsútgerð til at turka draktir og útgerð annars
- FRC-bátur er keyptur í Noregi og verður leveraður í viku xx 2001. Arbeitt verður í løtuni við at skaffa fígging til tilhoyrandi davidar.

# Útgerðaryvirlit fyri einum felags brand og bjargingarskúla.

## *Bygningar og høli*

- Garasja til brandbil
- Garasja til brandpumpur og tílíka útgerð
- Høli til kanning, reinsing og áfylling av trýstluftapparatum
- Kompressararúm, verkstaður
- Áfyllingarrúm til sløkkiamboð
- Goymslustað til hondsløkkjarar
- Umklæðingarrúm til dálkaði klæðir
- Garderoba til rein klæðir
- Vaskirúm til dálkaði klæðir
- Turkirúm til klæðir
- Fráheingingarpláss til roykkavaraapparat o.t.
- Goymslurúm (depot) til klæðir, stúlvar, hjálmar, handskar, o.t.
- Roykkavarabana
- Høli til ymsa sløkkiútgerð slangur, strálurør, forgreinarar, skúmútgerð o.t.
- Høli til bjargingarútgerð, tog, stigar, taljur, dunkraftir, klippi- og frígerðingarútgerð o.t.
- Høli til fyrstuhjálparútgerð, børur, teppi, dukkur og tílík venjingaramboð
- Høli til planspælbýin
- Goymsla til eldfiman løg og tílíkt tilfar
- 2 stk. 2400 l gasstangi, rørskipan og brennarar
- Yvirtendringscontainari
- Skrivstovur, kopirúm, bóka- og pappírgoymsla, arkiv o.t.
- Undirvísingarhøli og bólkarúm
- Frálærubøkur at útflýggja næmingum, pappír o.a.
- Køkur matgoymsla
- Starvsfólkarúm
- Matstova, sitistova, lesistova, TV-stova
- Sovikømur
- Baðirúm, vaski- og strúkirúm, turkirúm til næmingar og instruktørar
- Goymslurúm til ymiska fráseting
- Fýrrúm, grovkøk (kjallararúm)

## *Størri venjingarútgerð*

Brandbilur, brandpumpur, lítið og stórt oljukar 100 m2, gassbrennaraanlegg, brandhús sum maskinrúm minst 3 dekk, brandhús sum íbúðarhús, rør- og skipsinstallatiónir, høgur bygningur, containarar, samandottin bygningur til bjarging, venjingarøki, tunnilsmodul, koyrivegur, bilvrak, tangabilar, lendingarpláss til helikoptara, fleksibult lendi til venjingarøki.
Ringforbundin vatnveiting 1200 l/min í ein tíma, kloakk- og reinsiskipan til frárenning av stórari vatnnøgd og annað.

*Útgerð til manningar*

## Felags útgerð fyri land, bjarging, sjófólk og offshore.

30 stk. 12 kg. ABC-sløkkjarar
30 stk. 6 kg. $CO_2$-sløkkjarar
25 stk. à 15 m C-brandslangur við stortzkobling
10 stk. à 15 m B-slangur
2 stk. skúmrør LM 2-75
2 stk. skúmrør LS 2-15
2 stk. skúmtillandari
1 stk. lættskúmblandari
6 stk. Unifire strálurør 2"

## Útgerð til grund- og funktiónsútbúgving fyri sløkkiliðsmanningar

Leysar A, B, C, E og 110 súgvislangur til frálæru.
Brandteppi, hondsløkkiamboð, slangulyglar o.t.
Hondverktoy, øks, kúbein, sagir, tengur, lyktir o.t.
Brandbil 16/8 fult útgjørdur + eyka B- og C strálurør.
2 – 3 eyka kurvar við B – og C slangum
Eitt eksplosjónsskáp
Treylari við Trin 1 dálkingarútgerð
Brandpostar B og C

Páhengs- og beripumpur (seriupumping)
Airbags og bilselar til undirvísing
Springteppi, springpúta
11 m skjótistiga og aðrar stigar
Vinkulslípari, motorketusag, hydraulisk klippiamboð.
Glassag, autokørnari, uppklossingar og kílar, selaknív og onnur hondamboð

## Klassaútgerð

Til 2 flokksrúm til u.l. 2 x 14 næmingar :
Borð og stólar v.m.
Overheadprosjektørur
Vidiokanón
Talvur, svørt og hvít
Strálurør, skúmrør og ymisk slangursløg
Sundurskornir og tómir eldskøkkjarar
Overheadtransperant um eldsløkking o.t.
Ymisk trygdarútgerð, eksplosimetur, kemikaliedrakt
Nýggjar branddraktir Musk-OX
Pettir av ymsum eldfimum evnum
Klassasett av ymsum lærubókum og annað.

**Máltal: 44200/5-4/010450/6-/CR**

**Kunningarferð týsdagin 6. mars 2001**
**Til Hósvíkar og Klaksvíkar**

Við á kunningarferðini vóru: Súsanna E. Sørensen, Eyðun Berth Jacobsen, Petur Lava Olsen, Óli Hans Hammer Olsen og Claus Reistrup (skrivari).

**Hósvík**
Fundur var kl. 8.40 við umboð fyri Hósvíkar Býráð.

Óli Hans legði fyri við at kunna um arbeiðið hjá bólkinum, og at tað er neyðugt, at trygdarvirksemið verður samskipað, av tí at landið er so lítið. Brúk verður fyri einar 10.000 – 15.000 fermetrar. Bólkurin vildi gjarna vita, um Hósvíkar Kommuna var til reiðar at húsa eina støð, sum skuldi taka seg av trygdarvirksemi.

Tosað varð økið sunnanfyri Brandskúlan, sum er umleið 16.000 fermetrar til støddar, og sum er slættað. Nakað av jørðini er kongs. Um virksemið verður stórt ber til at keypa jørd frá bóndanum. Sambært galdandi býarætlan er økið lagt út sum ídnaðarøki, og sostatt er eingin forðing. Kommunan er í ferð við at gera nýggja býarætlan, og økið skal framvegis vera ídnaðarøki. Dýpið farmvið er gott, men tað skal kannast nærri hjá Landsverkfrøðinginum.

Um nakað skal byggjast á økinum, skal friðingarnevndin tó góðkenna eina ætlan. Ein fyribils góðkenning liggur tó í, at bandsskúlin longu liggur har.

Óli Hans kunnaði um samstarvið millum NUTEC og Føroya Sjómansskúla. Eyðun segði frá, at bólkurin hevur biðið ein verkfrøðing kanna økini, sum hugt verður at, fyri at gera kostnaðarmeting, og tí kom ein verkfrøðingur framvið heilt skjótt. Kommunan segði, at hetta var alt í lagi.

Kommuna segði, at hon í leigu tók 12 kr pr. fermetur um árið fyri øki, sum hevði grús. Um økið er asfalterað so 20 kr, og um økið er stoypt so 36 kr. Tað skal kannast, um neyðugt verður at gera nýggjan veg, men hinvegin verður ferðslan ikki nógv.

Fyrispurningur var, um nóg nógv var til av vatni, og svarið var ja.

Niðurstøða: Økið liggur har, og tað kann brúkast til trygdarmiðstøð, og kommunan tekur undir við tí. Bólkurin fekk eitt kort við, soleiðis at økið kann verða nærri kannað.

Fundurin lokin kl. 9.25.

Aftaná fór bólkurin og hugdi at økinum.

**Klaksvík**
13.20 fóru vit at hyggja at Trygdarmiðstøðini við Borðoyavík. Høli var til draktir umframt skifttingar- og brúsurúm. Sóu eisini radaraútgerðina.

Sóu eisini brandvenjingarøkið hjá Trygdarmiðstøðini. Har var samlibrunnur til frárensluvatn, við skiljara. Dýpið er gott útfrá.

Seinni fóru vit norður til strond. Har skal fyllast út, um økið skal brúkast, og tað fer at kosta nakað væl.

Aftaná fóru vit til grótbrotið, og har er nógv pláss. Vit kunnu uttan himpr fáa 15.000 fermetrar. Leiguprísurin er 12,70 kr pr. fermetar pr. ár fyri grúsálagt øki, og nakað meiri um økið er stoypt ella asfalterað.

**Fundur kl. 15.00 við Klaksvíkar Kommunu**
Rundtúrurin hevur víst á fleiri møguleikar, eitt nú hylurin við Borðoyarvík. Hvussu tað er við brandvenjing við Boroyarvík er ivasamt, orsakað av húsum í nánd.

Tað ber til at seta skott í part av bátahylinum, so hann kann nýtast til bátavenjing/svimjing. Umboðini frá býráðnum søgdu frá, at bátahylurin verður ikki fullnýttur, sum er, og tí ber til at nýta sunnari partin av honum til annað endamál.

Heri teknaði, hvussu spunsveggurin kundi setast upp. Tað ber til at hava fríttfallsbátavenjing í hylinum. Tað ber helst eisini til at gera "tyrlusøkking". Ein alari skal hava eitt øki sunnanfyri húsini á kaikantinum, men tað ber til at útvega lendi norðureftir.

Tað ber helst eisni til at fylla upp sunnanfyri bátahylin, serliga tá ið/um tunnulin kemur.

Tað ber til at hava undirvísngarhøli saman við brandvenjingarstøð, og so hava bátavenjingar aðrastaðni.

Møguleiki skal vera fyri seinni at gera venjing við tyrlusøkking, tí vit vita ikki, um olja verður.

Vit mugu hava tekningar av økjunum, og Heri fer at senda Óla Hans tekningarnar. Tilskilast skal eisini, hvat økini eru løgd út til sambært býarætlanini. Leigan skal tilskilast, eins og frástøðan til nærmastu hús.

Eyðun segði frá, at ein verkfrøðingur fer at kanna økini fyri at gera kostnaðarmeting.

Óli Hans segði, at ætlanin er at koma við einum áliti um ein góðan mánað, og at álitið setur upp, hvussu útgerðin er á staðnum, og hvussu nógv tað fer at kosta at gera umstøðurnar hóskandi.

Eyðun spurdi, um øll viðuskifti við Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Arbeiðseftirlitinum eru í lagi. Svarið var ja.

MOB-bátur kemur skjótt til Trygdarmiðstøðina.

Nevndin fer at seta nakrar parametrar upp, soleiðis at støða politisk kann takast til, hvar trygdarstøð skal liggja. Klaksvíkar Kommuna fekk at vita, at vit eisini hava tosað við Hósvíkar Kommunu.

Heri fer at taka myndir av økjunum og senda tey sum teldupost til bólkin. Tíðarætlanin viðvíkjandi grótbrotinum er, at um ein eitt hálvt ár er liðugt at sprongja hillina lidna. Og so verður einki meiri av stórspreinging.

Einki er sett av á fíggjarlógini í ár, men hinvegin skal fíggjarlógin fyri komandi árið tilevnast nú, og tí hevur arbeiðsbólkurin eisini skund at gera tilmæli.

Umleið 6 km eru millum grótbrotið og Borðoyavík.

Fundurin lokin kl. 15.35.

*Fundarfrásøgn*
*Claus Reistrup*

sP/f Westtec Ráðgevandi innan Arkitekt- verk- & búskaparfrøði FO-380 Sørvágur Faroe Island
Tlf. +333366 - fax: +333367 - mobil: +213366 & +225099 Http:// www.westtec.com E-mail: wtec@westtec.com



# Føroya Trygdardepil

## Brand- & Bjargingarskúli - Trygdarmiðstøð

Sørvágur Apríl 2001

Broytt í Mai 2001



WT:
Jákup Á Stonganum arkitektur - Poul A. Jacobsen verkfrøðingur, HD – Sofus Jacobsen HD

**Viðv. Trygdardepli í Føroyum** ........ 1

**Inngangur** ........ 1

**Avmarking** ........ 1

**Trygdardepilin** ........ 2

**Uttandura venjingarøki** ........ 3

**Grótbrotið við Strond** ........ 3

**Heildarskipan í grótbrotinum við Strond** ........ 3

**Kostnaður** ........ 4

**Trygdarmiðstøðin á Borðoyarvík** ........ 5

**Borðoyarvík sum Trygdardepil** ........ 5

**Brandskúlin við Áir** ........ 6

**Økið við Áir** ........ 7

**Alternativt uppskot við Strond** ........ 8

**Viðmerkingar til kostnaðarmetingarnar** ........ 9

**Hjábløð: Yvirlit yvir fermetrar v.m.**

**Tekningar:** **Uppskot Við Strond**
**Uppskot Við Áir**

**Viðv. Trygdardepli í Føroyum**
Vísandi til fund hin 20. mars 2001 viðv. trygdardepli, verður her send frágreiðing, serliga viðvíkjandi tí ið umfatar bygningar og plasering í mun til ávístu økini.

Frágreiðingin er grunda á:

- Fund við kanningarnevndina hin 20. mars 2001
- Vitjan á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík hin 11. apríl 2001
- Vitjan á Brandskúlanum við Áir hin 18. apríl 2001
- Umframt útflýggja tilfar frá nevndini o.a.

## Inngangur

Fyri at náa einari niðurstøðu, er av stórum týdningi at gera greitt hvussu kanningin er skipað og serliga hvat ikki er tikið við, hetta fyri at ivi ikki skal verða um grundarlagi og fyri at staðfesta hvørjar avmarkingar eru í mun til tey økini ið hugt verður eftir.
Tað vilja altíð verða ivaspurningar, og hátturin ið nýttur verður til at greina sundur lutirnar í einari lýsing kann hava ávirkan á úrslitið.
Soleiðis sum hendan frágreiðing er sett upp, eru tríggjar greiningar:




Greinarnar:

1. Námsfrøðiligi parturin viðgerð verandi "bygningsfysisku" karmarnar á støðunum við atliti til hvat restar í av hølum v.m. fyri at røkka málinum at skipað ein fullfiggjaðan trygdardepil.
2. Plaseringin viðgerð tey trí økini ið hugt er eftir: Við Áir, Borðoyarvík og Við Strond.
3. Umframt omanfyrinevndu, verða eisini onnur viðurskifti, sum mett verða at hava týdning, tikin við, herundir ein lýsing av verandi viðurskiftum og ein lýsing av hvat ein trygdardepil er/kann vera.

Serstak lýsing er gjørd fyri trygdardepilin, uttan mun til plasering.

## Avmarking

Viðmerkjast skal at talan bert er um kanning av økinum við Áir og tveimum økjum í Klaksvík: Borðoyarvík og grótbrotið við Strond. Onnur økir í Føroyum eru ikki kannað, men fyri at fáa eitt samanberingargrundarlag, er gjørd ein meting av hvat kostnaðurin áleið er, um nýggjur trygdardepil verður bygdur. Fyritreytirnar hesum viðv. verða lýstar seinni.

Viðmerkjast skal at ikki er mett um árin av møguligari dálking, eitt nú av óhappum við olju ella vandamiklum evnum.

**Trygdardepilin**
Við atliti til at savna saman og skipað **eitt** útbúgvingarstað í Føroyum sum kann nøkta tørvin í dag, umframt at hava møguleika fyri øktum virksemi, -t.d. í samband við oljuvinnu-, er niðanfyri ein meting av neyðugum fermetratali á bygningum og uttanumøki, soleiðis sum m.a. nevndin hevur greitt frá. Herumframt er gjørd ein kostnaðarmeting av einstøku bygningunum við støði í teimum lyklatølum sum vit kenna ídag.
Endamálið við hesum er at gera eitt dømi har sæð verður burtur frá verandi føstum útbúnaði við Áir og í Klaksvík. Hetta merkir at uppstillingin kann brúkast sum vegleiðandi í samband við kostnaðin av at byggja nýggjan trygdardepil, uttan mun til hvar í landinum hann verður lagdur.
Tað er tó ein fyritreyt, at hóskandi planerað lendi er til taks og at hetta liggur við sjóarmálan.

**Rúmskipan**
Samsvarandi upplýsingum frá nevndini og viðtalum á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík og á Brandskúlanum við Áir, er her gjørd ein meting av neyðugum hølum til ein Trygdardepil.
Talan er um eina hølisskipan, - bygningar-, sum nøkta tørvin til ein fullfiggjaðan Brand- og bjargingarskúla og Trygdarmiðstøð, soleiðis sum vit kenna viðurskiftini nú, umframt at tikin er hædd fyri framtíðar avbjóðingum, í tann mun hetta er gjørligt.

| | **Trygdardepil** | **Rúm** | | | | **Rúm** | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **010** | **Útgerð & venjing** | **stk.** | **m2** | **020** | **Handfaring** | **stk.** | **m2** |
| 010 | Bilhús til brandbil pumpur o.a. | 1 | 80 | 020 | Umklæðingarrúm | 2 | (30+30) |
| 010 | Roykkavaraverkst. & kompressararúm | 1 | 40 | 020 | Vaski- og turkirúm til brandklæðir, flótidraktir o.t. | 2 | (30+30) |
| 010 | Goymslur & áfylling til hondsløkkjarar | 2 | (25+40) | 020 | Goymsla til nýggj brandklæðir, persón útgerð o.t. | 2 | (30+30) |
| 010 | Roykkavarabani írokn. klárgering & frálæra | 2 | (50+25) | | | 6 | 180 |
| 010 | Sløkki- og roykkavaraútgerð | 1 | 30 | **040** | **Bústaður** | | |
| 010 | Bjargingar- og fyrstuhj.útgerð o.t | 2 | (50+30) | 040 | Goymslurúm | 2 | (20+20) |
| | | 9 | 370 | 040 | Fýrrúm & grovkøkur | 1 | 20 |
| | | | | 040 | Køkur, kantina, goymsla o.a. | 1 | 120 |
| **030** | **Teoretisk frálæra** | | | 040 | Uppihaldsstova tv-rúm v.m. | 1 | 50 |
| 030 | Undirvísingarhøli: teori, praktik og planspæl | 1 | 150 | 040 | Bústaðarrúm til 24 næmingar | 12+6 | (12+8) |
| 030 | Vanlig klassahølir | 3 | (40+80+80) | 040 | Vaski- og turkirúm | 1 | 25 |
| 030 | Skrivstovur | 3 | (15+15+15) | | | 24 | 505 |
| 030 | Mámsfrøðiligur verkstaður | 2 | (20+20) | **050** | **Venjingarhøll við hyli** | 1 | 700 |
| 030 | Starvsfólka- & fundarrúm | 2 | (30+30) | | (hylur 300 m2) | | |
| 030 | Høli til ymist | 2 | (80+20) | | **Samanlagt:** | 54 | **2.365** |
| 030 | Goymsla til brennievni | 1 | 15 | | **Økið annars uml.** | | 27.000 |
| | | 14 | 610 | | | | |

Metingin er gjørd soleiðis at rúmskipanin er býtt upp í so natúrligar eindir sum gjørligt. Hervið er ikki sagt at talan skal vera um fleiri ymiskar bygningar, men tað er vanliga ein fyrimunur at bilhús og goymslur ikki eru saman við frálæruhølum o.t.
Samsvarandi hesum, er komið fram til at neyðuga víddin til hølir skal vera minst 6.000 fermetrar, - tá er uttanduraøki, t.d. p-pláss íroknað. Herumfamt krevst eitt venjingarøkið áleið **20.000** fermetrar.


WT:
Jákup Á Stongum arkitektur - Poul A. Jacobsen verkfrøðingur, HD – Sofus Jacobsen HD

**Uttandura venjingarøki**
Uppstillingin av uttandura venjingarøkinum er grundað á tað virksemið sum nú er á Trygdarmiðstøðini og á Brandskúlanum, umframt aðrar funktiónir sum undir verandi umstøðum ikki eru til taks.

| 080 | **Uttandura venjingar & veitingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 080 | Vatnveiting & brandpostar | 080 | Gassbrennianlegg | 080 | 1 FRC í daviti |
| 080 | Oljuútskiljari | 080 | Tunnilsmodul | 080 | 1 Fríttfallsbátur við palli |
| 080 | Oljukør | 080 | Tyrluatrapp | 080 | Krani til bjargingarflaka |
| 080 | Brandhús | 080 | Tyrlulendingarpláss | 080 | Atløgubryggja til bjargingarbátar |
| 080 | Skipsrúm | 080 | 2 Bjargingarbátar í davitum | 080 | Økið annars |

Viðmerkjast skal at "venjingarbýur" ikki er tikin við, tvs. at bygningar har møguleiki er fyri brand- og bjargingarroyndum, eitt nú íbúðarhús, høgir bygningar o.t. ikki eru iroknaðir.

**Grótbrotið við Strond**
Sum partur av kanningini er hugt eftir grótbrotinum við Strond í Klaksvík.
Klaksvíkar kommuna hevur við skrivi 14. mars 2001 boða frá at uml. 6.000 m$^2$ av økinum kunnu verða tøkir um eitt ár og 6.000 m$^2$ aftrat um tvey ár.
Tekniskt er økið sera áhugavert, serliga tí at einki er bygt framman undan og tí at tað her skuldi verið góðir møguleikar fyri útbygging um nóg vítt lendi verður avlagt.

**Heildarskipan í grótbrotinum við Strond**
Við grundarlagi í sundurgreiningini av neyðugum hølum og uttanduraøki, er hjáløgd tekning av hvussu ein Trygdardepil kann síggja út á tí best egnaða staðnum. Grótbrotið við Strond er vælegnað:

- Her er talan um plasering á einum staði fram við sjóarmálan, har einki er bygt og har pláss er til endamálið.

Í høvuðsheitum verða økið og bygningar skipaðir soleiðis at brandparturin og "trygdarparturin"[1] verða fyri seg, brandvenjingarnar og serliga eldur/roykur verður lagdar so langt frá frálæru og bústaði sum gjørligt.
Á økinum eru lagdir hesir bygningar:

- Umsiting & frálæra
- Búrúm
- Venjingarhøll og útgerð
- Bilhús/ brandtænasta og útgerð

Herumframt er venjingarøki, útbúnaður og bryggjukantur.
Samlaða fermeturtali á bygningunum er mett til at vera uml. 2.300 og á økinum sum heild eru uml. 30.000 fermetrar tøkir.

Í samband við bygningarnar so er ætlanin at øll faklig frálæra og umsiting verður løgd í ein bygning, soleiðis at útbúnaður og hølir kunnu vera brúkt í mesta mun.
Við síðuna av frálæru- og umsitingarbygninginum er bústovnur til 24 næmingar við matstovuútgerð og tí útbúna sum annars krevst í hesum sambandi.
Nakað frá umsitingarbygninginum er ein venjingarhøll uppá 700 m$^2$. Í høllini er ein uml. 300 m$^2$ hylur við aldugera. Dýpið á hylinum er sett til 4 metrar. Umframt hylin eru hølir til umklæðing, goymslu o.a. soleiðis at venjingarparturin hjá Trygdarmiðstøðini kann fremjast her.
Høllin er bygd út ímóti bryggjukanti har uttandura venjingarnar við bjargingarbátum o.t. fara fram.

[1] Hetta er virksemi sum nú er á Trygdarmiðstøðini í Klaksvík

Samsvarandi tí sum her er sett upp, er bryggjukanturin avsettur til at verða uml. 100 metur, hetta er uml. 65 metur longur enn kanturin við Trygdarmiðstøðina á Borðoyarvík. Orsøkin til at bryggjan er longd er m.a. at møguleiki skal vera fyri at størri skip fáa atløgupláss í samband við venjingar, - t.d. við oljusperringum,- og at pláss skal vera fyri innskipan av útgerð sum brúk er fyri aðrastaðni, eitt nú í vandastøðu.

## Kostnaður

Við omanfyrinevndu fyritreytum sum grundarlag er sett upp eitt yvirlit yvir kostnaðin av einum Trygdardepli, har talan er um nýbygningar á einum uml. 30.000 m$^2$ øki við sjóðarmálan sum umfatar eina heild við: frálæru, bústaði, venjingarútbúnaði og fyrisiting savna saman á einum staði.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Trygdardepil** | | | | | |
| **Kostnaðarmeting av nýggjum depli.** | | | | | |
| | | | **fermetrar** | **ákr.** | **kr. Samanlagt** |
| 010 | **Útgerð & venjing** | Bilhús, roykkavaraverkst., goymslur, roykbani, v.m. | **370** | kr 10.500 | kr 3.885.000 |
| 020 | **Handfaring** | Umklæðingarrúm, vaski- & turkirúm, goymslur | **180** | kr 14.000 | kr 2.520.000 |
| 030 | **Teoretisk frálæra** | Undirvísingarhølir, starvsfólkarúm o.t | **610** | kr 15.000 | kr 9.150.000 |
| 040 | **Bústaður** | Køkur, kantina, kømur, goymsla, o.a. | **505** | kr 14.000 | kr 7.070.000 |
| 050 | **Venjingarhøll við hyli** | Høll við hyli (300 m2) og aldugeneratori | **700** | kr 9.000 | kr 6.300.000 |
| | | | **2.365 m2** | kr 12.230 | kr 28.925.000 |
| 080 | **Uttandura venjingar & Veitingar** | Vatnveiting, Brandhús, gassbrenni-anlegg, oljuplattur, pallur til fríttfalls-bát v.m. | **1.500 m2** | kr 3.000 | kr 4.500.000 |
| | | Atløgubryggja til bjargingarbátar | **100 m** | kr 75.000 | kr 7.500.000 |
| | | Asfaltering & stoypíng av øki | **12.000 m2** | kr 250 | kr 3.000.000 |
| | | | | | kr 15.000.000 |
| | **Samanlagt:** | | | | kr 43.925.000 |
| | **Ókendt:** | | | 10% | kr 4.392.500 |
| | **Samanlagt:** | | | | **kr 48.317.500** |
| | Leiga av lendi pr. ár: | | **30.000 m2** | kr 13 | kr 381.000 |

Út frá hesum kann sigast at samlaði kostnaðurin fyri ein fult útbygdan Trygdardepil er áleið 48 mió. Tá er roknað við nýbygging av bygningum til brand, bjarging og trygd, umframt skipan av uttandura venjingarøki.

Sum áður nevnt, er endamálið við hesari lýsing at vísa á hvussu ein Trygdardepil kann síggja út og hvat kostnaðurin er.
Uttan mun til um depilin verður bygdur, er tað av stórum týdningi at fáa eina heildarmynd av hvussu depilin kann skipast, hetta m.a fyri at byggingin kann vera framd í pørtum samsvarandi einari góðkendari heildarætlan, soleiðis at tilvildarlig bygging ikki forar fyri skilagóðum útbyggingarmøguleikum.

Tá tað her er víst á ein tørv á lendi svarandi til uml. 30.000 m$^2$, skal viðmerkjast at tað ber til at skipað ein Trygdardepil á einum øki sum er uml. 15.000 m$^2$, men at hetta viðførur munandi avmarkingar. Hvussu hetta kann gerast er nærri lýst seinni.

**Trygdarmiðstøðin á Borðoyarvík**
Í samband við verkætlanina hava vit fingið útflýggja ymist tilfar viðv. Trygdarmiðstøðini á Borðoyarvík, umframt at vit hava vitja á staðnum.



Miðstøðin, -sum fevnir um ein 100 $m^2$ bygning-, er sett á økið við bátahylin á Borðoyarvík. Framvið bygninginum er ein 35 m long atløgubryggja har bjargingarbátar eru uppsettir. Í byggninginum er goymsla og verkstaður í einum rúmi sum samanlagt er 60 $m^2$, herafturat er 40 $m^2$ umklæðing og á loftinum eru innrættaðir uml. 40 $m^2$ til samskiftis-hølið.

Nærhendis miðstøðini er ein 400 $m^2$ innigirdur eldsløkkipallur við kørum.

Bygningur, bryggja og pallur verður brúkt í samband við praktiskar venjingar, meðan teoretiska frálæran er í hølum hjá Tekniska skúla, ið eisini liggur nærhendis.

**Borðoyarvík sum Trygdardepil**
Verður økið við Borðoyarvík samanborið við áður lýsta tørvin á bygningum og venjingarøki, -við atliti til at skipa ein fullfíggjaðan Trygdardepil-, eru tað fleiri viðurskifti sum skulu havast í huga tá mett verður um tað ber til at leggja depilin her, m.a.

- virksemi í dag
- útbyggingarmøguleikar
- árin á nærumhvørvið

Soleiðis sum vit hava skilt støðuna, so nøktar verandi bygningur, -saman við venjingarøkinum-, illa nokk tørvin í dag, samsvarandi tí frálæru sum er á staðnum. Skal virksemið víðkast, verður neyðugt við útbyggingum, bæði viðv. bygningum og installasjónum. Her verður serliga hugsa um venjingar-høll við hyli og aldugera. Herafturat hevur ynskið leingi verið at fáa fleiri skúlastovur.

Eftir at hava kannað ymisku møguleikarnar á Borðoyarvík, má staðfestast at pláss ikki er fyri at leggja ein fullfíggjaðan Trygdardepil her, tað ber til at gera eina høll á staðnum, men ikki er rúm fyri stórvegis uttandura venjingarøki annars. Hetta merkir at um Trygdardepilin verður býttur upp í partar, kann **ein** av hesum vera lagdur á Boroyðarvík, men spurningurin er um hetta er rætta loysnin, serliga tá aðrir møguleikar eru.
Av øðrum týðandi viðurskiftum skal verða gjørt greitt, at ein útbygging á Borðoyarvík fer at viðføra at ein munandi størri partur at bátahylinum og økinum rundanum skal brúkast til venjingarendamál. Hvussu hetta kemur at ávirka teir ið eiga økið ella annars eru á økinum, -t.d. báteigarar-, er ikki mett um, men tað kann blíva ein trupulleiki at samskipa áhugamálini. Neyðugt verður í øllum førum at fáa greiðar langtíðaravtalur hesum viðv.
Tað sum kann fáa størsta týdning er ætlaði undirsjóvartunnilin, sum eftir tí ið upplýst er, verður lagdur upp á staðnum har Trygdarmiðstøðin nú er, hetta kann viðføra at tað verður sera óheppi at leggja virksemið við eldi og royki tætt upp at einari komandi høvuðsferðsluæðr.
Tað tykist sera fløkt at brúka fasta útbúnaðin, -bygningin og pall,- á Borðoyavík í samband við ein Trygdardepil við Strond.

**Brandskúlin við Áir**



Samsvarandi tí ið varð nevnt viðv. Trygdarmiðstøðini, hava vit somuleiðis fingið tilfar og vitja Brandskúlan við Áir.
Hesin skúli hevur nú í eitt langt áramál verið karmur um útbúgving og venjing fyri sløkkilið og sjófólk. Hóast partar av bygningunum ikki eru tíðarhóskandi, so er tað á hesum staði í landinum at stórsti parturin av hølum og útbúnaði er til taks.
Á økinum eru bygningar við undirvísingarhølum, bilhús, roykkavarabani, goymslur, uttandura venjingarøki við brandhúsi, oljukari o.t.

Sum naturligur partur av økinum er planera eitt uml. 15000 m$^2$ stórt ídnaðarøki, sum møguleiki er fyri at brúka í samband við ein Trygdardepil.
Herumframt liggur ALV-skulin á økinum, og hóast hann ikki er partur av brandskúlanum so eiga møguleikarnir at verða kannaðir fyri at yvirtaka skúlan, um so er at Trygdardepilin verður lagdur her. Í ALV-skúlanum eru góð bústaðarviðurskifti, undirvísingarhølir, matarhølir v.m., sum eru eitt skilagott alternativ til at byggja av nýggjum.

Geografist liggur Brandskúlin væl fyri við Áir, tí møguleikar eru at ferðast dagliga ímillum heimstað og skúlan hjá flest øllum næmingunum í landinum. Tó hava næmingar úr Suðuroy ikki hendan møguleika.
Plaseringin viðførur at tørvurin á bústøðum á staðnum verður avmarkaður.

Tað sum serliga lýtur økið er, at skipanin av venjingarøkinum sær út til at vera farin fram, uttan at stórvegis hædd er tikin fyri framtíðar víðkan av virkseminum. Her skal vera nevnt plasering av brandhúsi og platti til gassanlegg. Serliga brandhúsið er sett á eitt sera óheppi stað:
Í fyrsta lagi so forar hetta fyri eini skilagóðari tilkoyring til økið sunnanfyri, og í ørðum lagi er tað sett ov nær undirvísingarbygninginum.



Spurt hevur verið um ampi er av royki í samband við venjingarnar, men her er upplýst at tað ikki hava verið stórvegis trupuleikar hesum viðv., tó skal viðmerkjast at økið liggur tæt uppat landsvegnum og tað kann hugsast at hetta kan viðføra avmarkingar í samband við økt virksemi.

Norðanfyri Brandskúlan liggur gamla hvalastøðin sum Føroya Landsstýri er eigari av. Vit hava ikki kunnleika til hvat ætlanin er við hesum øki, men bygningarnir eru í sera vánaligum standi og ivasamt er um tað er gjørligt at varðveita teir.
Verða bygningarnir niðurtiknir kann hetta økið eisini vera tøkt sum partur av Trygdardeplinum.
Í hjálagda uppskotið er tó ikki tikin hædd fyri hesum møguleika.

**Økið við Áir**

Í uppskotinum verða teir bygningar sum eru í hóskiligum standi brúktir í samband við Trygdar-depilin, tó er økið umskipa í eindir har brandparturin verður savnaður saman og lagdur so langt frá frálæru og bústaði sum gjørligt.

Í høvuðsheitum eru broytingar hesar:

- Brandhús, kør og konteynarar verða flutt soleiðis at tilkoyringin kann leggjast inn á økið
- Nýtt bilhús og roykkavarabani verða bygt
- Frálæra og bústaður verður á ALV-skúlanum

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Kostnaðarmeting av Trygdardepli við Áir.** | | | | | |
| | | | | **fermetrar** | **ákr.** | **kr. Samanlagt** |
| | 010 | **Útgerð & venjing** | Bilhús, roykkavaraverkst., goymslur, roykbani, v.m. | **370** | kr 10.500 | kr 3.885.000 |
| | 020 | **Handfaring** | Umklæðingarrúm, vaski- & turkirúm, goymslur | **180** | kr 14.000 | kr 2.520.000 |
| | 030 | **Teoretisk frálæra** | **Keyp ella flyting av ALV-skúlanum** | | | kr 3.000.000 |
| | 040 | **Bústaður** | | | | |
| | 050 | **Venjingarhøll við hyli** | Høll við hyli (300 m2) og aldugeneratori | **700** | kr 9.000 | kr 6.300.000 |
| | | | | **1.250 m2** | kr 12.564 | kr 15.705.000 |
| | | | | | | |
| | 080 | **Uttandura venjingar & veitingar** | Vatnveiting, Brandhús, gassbrennianlegg, oljuplattur v.m. | **1.500 m2** | kr 3.000 | kr 4.500.000 |
| | | | Atløgubryggja til bjargingarbátar | **100 m** | kr 75.000 | kr 7.500.000 |
| | | | Asfaltering & stoyping av øki | **6.000 m2** | kr 250 | kr 1.500.000 |
| | | | | | | kr 13.500.000 |
| | | **Samanlagt:** | | | | kr 29.205.000 |
| | | **Ókendt:** | | | 10% | kr 2.920.500 |
| | | **Samanlagt:** | | | | **kr 32.125.500** |
| | | Leiga av lendi pr. ár: | | **20.000 m2** | kr 13 | kr 254.000 |
| | | | | | | |

Sum her víst verður kostnaðurin fyri at byggja ein Trygdardepil við Áir uml. 32 mió. Tá er økið umskipað, nýggjur bygningur bygdur til brandbil og roykbana, umframt at avsettar eru kr. 3 mió til flyting av ALV-skúlanum.

Verður tikið samanum tykjast fyrimunirnir størri enn vansarnir við at leggja Trygdardepilin við Áir. Fyrimunirnir eru tó nógv treytaðir av at ALV-skúlin verður tøkur til frálæru/bústað og at hinir bygningarnir ,- umsiting/frálæra, roykkavarabani, verkstaður, goymsla o.a.,- kunnu halda fram í verandi líki í eitt áramál. Við hesum kunnu íløgurnar til ein fullfíggjaðan Trygdardepil strekkjast yvir eitt longri tíðarskeið.

Økið kann tá byggjast í stigum, har t.d. venjingarhøllin við bryggjukanti verður bygd fyrst, saman við ný- og umskipan av tilkoyring og brandvenjingarútbúnaði. Seinnri kunnu gamla bilhúsið og roykkavarabygningurin takast burtur og nýtt bilhús og roykbani byggjast. Eftir tørvi kunnu so nýskipanir gerast á frálæru- og bústaðarpartinum.

**Alternativt uppskot við Strond**
Í alternativa uppskotinum við Strond er økið avmarkað til uml. 20.000 $m^2$.
Fyri at avmarka íløgukostnaðin er ein møguleiki ikki at byggja búrúm á økinum, men at fáa avtalu við t.d. Sjómansheimið og Skúlaheimi hesum viðv.

Annar møguleiki er at teoretiska frálæran eisini verður løgd á annan skúla ella stað í Klaksvík. Hetta er tó ikki besta loysnin m.a. tí at avstandurin millum Strond og Klaksvík er uml. 6 km. Herafturat koma leigu og/ella íløgukostnaður til um- ella nýbygging.

| **Kostnaðarmeting av Trygdardepli við Strond í Klaksvík. Avmarka skipan** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | | **fermetrar** | **ákr.** | **kr. Samanlagt** |
| **010** | **Útgerð & venjing** | Bilhús, roykkavaraverkst., goymslur, roykbani, v.m. | **370** | kr 10.500 | kr 3.885.000 |
| **020** | **Handfaring** | Umklæðingarrúm, vaski- & turkirúm, goymslur | **180** | kr 14.000 | kr 2.520.000 |
| **030** | **Teoretisk frálæra** | **Verður lagt á annan skúla í Klaksvík** | 370 | kr 15.000 | kr 5.550.000 |
| **040** | **Bústaður** | **Avtala uttanfyri skipanina** | 0 | 0 | kr 0 |
| **050** | **Venjingarhøll við hyli** | Høll við hyli (300 m2) og aldugeneratori | 700 | kr 9.000 | kr 6.300.000 |
| | | | **1.620 m2** | kr 11.269 | kr 18.255.000 |
| **080** | **Uttandura venjingar & Veitingar** | Vatnveiting, Brandhús, gassbrennianlegg, oljuplattur v.m. | | | |
| | | Atløgubryggja til bjargingarbátar | **1.500 m2** | kr 3.000 | kr 4.500.000 |
| | | Asfaltering & stoyping av øki | **100 m** | kr 75.000 | kr 7.500.000 |
| | | | **6.000 m2** | kr 250 | kr 1.500.000 |
| | **Samanlagt:** | | | | kr 31.755.000 |
| | **Ókendt:** | | | 10% | kr 3.175.500 |
| | **Samanlagt:** | | | | **kr 34.930.500** |
| | Leiga av lendi pr. ár: | | **20.000 m2** | kr 13 | kr 254.000 |

Kostnaðarmetingin er grundað á at teoretiska frálæran er løgd á ein av verandi skúlum í Klaksvík ella annað stað, og at tað í hesum sambandi verður neyðugt at útvega 370 $m^2$ av nýggjum frálæruhølum, starvsfólkarúmum v.m. Bústaðarrúm verða ikki bygd.

## Viðmerkingar til kostnaðarmetingarnar

Í omanfyristandandi uppstillingum framgongur at samlaði kostnaðurin er:

| | | Full skipan við Strond | Full skipan Við Áir | Avmarka skipan Við Strond | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Trygdardepil:** | | | | |
| | **Bygningar v.m.** | **kr 48.317.500** | **kr 32.125.500** | **kr 34.930.500** | |
| | Leiga av øki pr. ár: | kr 381.000 | kr 254.000 | kr 254.000 | |
| | Fermetur øki: | 30.000 m2 | 20.000 m2 | 20.000 m2 | |

Ein av trupuleikunum við samanberingini millum Áir og tað avmarkaðu skipanina við Strond er, at meðan alt virksemi er savna saman við Áir, er tann teoretiski og búparturin av ætlanini við Strond fluttur inn til Klaksvíkar.

Alt eftir um talan er um fullfíggjaðan Trygdardepil við búplássum ella um partar verða lagdir inni í Klaksvík, er kostnaður við Strond ávikavist mettur til uml. kr. 48 mió. fyri fulla úbygging og uml. kr. 35 mió. fyri ein avmarkaðan depil.

Í samband við Áir er mett at kostnaðurin fyri ein fullfíggjaðan Trygdardepil fer at liggja um kr. 32 mió, tá er roknað við at flyta partar av installasjónunum og at byggja nýggjan bygning til bilhús o.t, umframt venjingarhøll, bryggjukant v.m. Útreiðslurnar av at flyta ella keypa ALV-skúlan eru settar til kr. 3,0 mió.

Sørvágur apríl 2001
Broytt í Mai 2001

**Westtec sP/F**

Jákup Á Stongum Arkitektur Poul A. Jacobsen Verkfr.

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | **Trygdardepil fermetrar** | | | | |
| | | | **Brandpartur** | **Sjópartur /eyka** | **Samanlagt** |
| | **010** | **Útgerð & venjing** | m2 | m2 | |
| | 010 | Bilhús til brandbil pumpur o.a. | 80 | 0 | 80 |
| | 010 | Roykkavaraverkst. & kompressararúm | 40 | 0 | 40 |
| | 010 | Goymsla & áfylling til hondsløkkjarar | 25 | 30 | 55 |
| | 010 | Roykkavarabani írokn. klárgering & frálæra | 75 | 0 | 75 |
| | 010 | Sløkki- og roykkavaraútgerð | 30 | 0 | 30 |
| | 010 | Bjargingar- og fyrstuhj.útgerð o.t. | 50 | 30 | 80 |
| | | | 300 | 60 | 360 |
| | **020** | **Handfaring** | | | |
| | 020 | Umklæðingarrúm | 30 | 30 | 60 |
| | 020 | Vaski- og turkirúm til brandklæðir o.t. | 30 | 30 | 60 |
| | 020 | Goymsla til nýggj brandklæðir, persón útgerð o.t. | 30 | 30 | 60 |
| | | | 90 | 90 | 180 |
| | **030** | **Teoretisk frálæra** | | | |
| | 030 | Undirvísingarhøli: teori, praktik og planspæl | 150 | 0 | 150 |
| | 030 | Vanligt klassahøli | 40 | 80 | 120 |
| | 030 | Skrivstova | 15 | 15 | 30 |
| | 030 | Námsfrøðiligur verkstaður | 20 | 20 | 40 |
| | 030 | Starvsfólka- & fundarrúm | 30 | 30 | 60 |
| | 030 | Høli til ymist | 80 | 20 | 100 |
| | 030 | Goymsla til brennievni | 15 | 0 | 15 |
| | | | 350 | 165 | 515 |
| | **040** | **Bústaður** | | | |
| | 040 | Goymslurúm | 20 | 20 | 40 |
| | 040 | Fýrrúm & grovkøkur | 20 | 0 | 20 |
| | 040 | Køkur, kantina, goymsla o.a. | 120 | 0 | 120 |
| | 040 | Uppihaldsstova tv-rúm v.m. | 50 | 0 | 50 |
| | 040 | Bústaðarrúm til 24 næmingar | 250 | 0 | 250 |
| | 040 | Vaski- og turkirúm | 25 | 0 | 25 |
| | | | 485 | 20 | 505 |
| | **050** | **Venjingarhøll við hyli** | | 700 | 700 |
| | | Samanlagt: | 1.225 m2 | 1.035 m2 | 2.260 m2 |
| | **080** | **Uttandura venjingar & veitingar** | | | |
| | 080 | Vatnveiting & brandpostar | | | |
| | 080 | Oljuútskiljari | | | |
| | 080 | Oljukar | 50 | | |
| | 080 | Brandhús | 100 | | |
| | 080 | Skipsrúm | 50 | | |
| | 080 | Gassbrennianlegg | 300 | | |
| | 080 | Tunnilsmodul | 300 | | |
| | 080 | Tyrluatrapp | 50 | | |
| | 080 | Tyrlulendingarpláss | 500 | | |
| | 080 | Atløgubryggja til bjargingarbátar | 100 m | | |
| | 080 | Økið annars | 26.390 | | |
| | | | 30.000 | | |

| **Trygdardepil**<br>**Verandi víddir**<br>(ALV-Skúlin og Tekniski skúli IKKI íroknað) | | **Neyðugir** | Er tiltaks ídag | | Írestar ídag | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | **ferðmetrar** | **Við Áir** | **Borð.vik** | **Við Áir** | **Borð.vik** |
| **010** | **Útgerð & venjing** | **m2** | m2 | m2 | m2 | m2 |
| 010 | Bilhús til brandbil pumpur o.a. | **80** | 80 | 0 | 0 | 80 |
| 010 | Roykkavaraverkst. & kompressararúm | **40** | 40 | 0 | 0 | 40 |
| 010 | Goymslur & áfylling til hondsløkkjarar | **55** | 20 | 60 | 35 | -5 |
| 010 | Roykkavarabani írokn. klárgering & frálæra | **75** | 75 | 0 | 0 | 75 |
| 010 | Sløkki- og roykkavaraútgerð | **30** | 15 | 0 | 15 | 30 |
| 010 | Bjargingar- og fyrstuhj.útgerð o.t. | **80** | 20 | 0 | 60 | 80 |
| | | **360** | 250 | 60 | 110 | 300 |
| **020** | **Handfaring** | | | | | |
| 020 | Umklæðingarrúm | **60** | 10 | 40 | 50 | 20 |
| 020 | Vaski- og turkirúm til brandklæðir, flótidraktir o.t. | **60** | 0 | 0 | 60 | 60 |
| 020 | Goymsla til nýggj brandklæðir, persón útgerð o.t. | **60** | 5 | 0 | 55 | 60 |
| | | **180** | 15 | 40 | 165 | 140 |
| **030** | **Teoretisk frálæra** | | | | | |
| 030 | Undirvísingarhøli: teori, praktik og planspæl | **150** | 150 | 0 | 0 | 150 |
| 030 | Vanlig klassahølir | **120** | 40 | 0 | 80 | 120 |
| 030 | Skrivstovur | **30** | 15 | 0 | 15 | 30 |
| 030 | Námsfrøðiligur verkstaður | **40** | 20 | 0 | 20 | 40 |
| 030 | Starvsfólka- & fundarrúm | **60** | 0 | 0 | 60 | 60 |
| 030 | Høli til ymist | **100** | 0 | 0 | 100 | 100 |
| 030 | Goymsla til brennievni | **15** | 12 | 0 | 3 | 15 |
| | | **515** | 237 | 0 | 278 | 515 |
| **040** | **Bústaður** | | | | | |
| 040 | Goymslurúm | **40** | 0 | 0 | 40 | 40 |
| 040 | Fýrrúm & grovkøkur | **20** | 20 | 0 | 0 | 20 |
| 040 | Køkur, kantina, goymsla o.a. | **120** | 80 | 0 | 40 | 120 |
| 040 | Uppihaldsstova tv-rúm v.m. | **50** | 0 | 0 | 50 | 50 |
| 040 | Bústaðarrúm til 24 næmingar | **250** | 36 | 0 | 214 | 250 |
| 040 | Vaski- og turkirúm | **25** | 0 | 0 | 25 | 25 |
| | | **505** | 136 | 0 | 369 | 505 |
| **050** | **Venjingarhøll við hyli** | **700** | 0 | 0 | 700 | 700 |
| | Samanlagt: | **2.260 m2** | 638 m2 | 100 m2 | 1.622 m2 | 2.160 m2 |
| **080** | **Uttandura venjingar & veitingar** | | | | | |
| 080 | Vatnveiting & brandpostar | | | | | |
| 080 | Oljuútskiljari | | | | | |
| 080 | Oljukør | **50** | | | | |
| 080 | Brandhús | **100** | | | | |
| 080 | Skipsrúm | **50** | | | | |
| 080 | Gassbrennianlegg | **300** | | | | |
| 080 | Tunnilsmodul | **300** | | | | |
| 080 | Tyrluatrapp | **50** | | | | |
| 080 | Tyrlulendingarpláss | **500** | | | | |
| 080 | 2 Bjargingarbátar í davitum | **20** | | | | |
| 080 | 1 FRC í daviti | **20** | | | | |
| 080 | 1 Fríttfallsbátur við palli | **50** | | | | |
| 080 | Krani til bjargingarflaka | **30** | | | | |
| 080 | Atløgubryggja til bjargingarbátar | **100 m** | | | | |
| 080 | Økið annars | **26.270** | | | | |
| | | **30.000** | | | | |
| | | | | | | |
| Viðmerkjast skal, at møguleikarnir at brúka ALV-skúlan ikki eru tiknir við í hesum yvirliti, eins og verandi undirvísingarhølir hjá Trygdarmiðstøðini á Tekniska skúla í Klaksvík ikki eru við. | | | | | | |
| | | | | | | |



WT:
Jákup Á Stongum arkitektur - Poul A. Jacobsen verkfrøðingur, HD – Sofus Jacobsen HD








| Føroya Landstýri | | |
|---|---|---|
| Trygdardepil í grótbrotinum við Strond | Dagsett: Maj: 2001 | Tekn.Nr.0001 |
| Uppskot 1 | Mát: 1:2000 | Tekna: JáS |
| sPF West-tec FO-380 Sørvágur | | |



Perspektiv



Isometri

Støðuplanur:

A: Umsiting/Frálæra/Búrúm
B: Tyrlupallur
C: Bryggjukantur
D: Venjingarhøll
E: Bilhús/brandtænasta & útgerð
F: Størri venjingarútgerð

Mát: 1:2000




| Føroya Landstýri | | |
|---|---|---|
| Trygdardepil við Áir | Dagsett: Maj: 2001 | Tekn.Nr.0002 |
| Uppskot 1 | Mát: 1:2000 | Tekna: JáS |
| sPF West-tec FO-380 Sørvágur | | |